## Svii undir illgruna

Dómsvaldið í Póllandi gav í gjár boð um, at ein svii skal handtakast, tí illgruni eru um, at tað var hann, sum skipaði fyri, tá skeltið uttan fyri fyrrverandi týningarleguna Auschwitz bleiv stolið herfyri. Skeltið við teimum kendu orðunum "Arbeit macht frei" kom seinni afturíaftur, men var tá skorið sundur í trý pettir. Løgreglan í Póllandi hevur tikið fimm menn. Teir eru skuldsettir fyri at hava tikið skeltið niður og fyri at hava skorið tað sundur, men polska løgreglan heldur, at tað var ein maður í Svøríki, sum legði atgerðina til rættis.




## Sigarettin sprongdist

Tann 31 ára gamli indonesiski trygdarmaðurin Andi Susanto misti seks tenn, tá ein sigarett av einari ella aðrari orsøk brast millum varrar hansara. Nú hevur verksmiðjan, sum sigarettin stavaði frá, játtað at rinda tí óhepna roykjaranum endurgjald. Harumframt hevur verksmiðjan, sum eitur PT Nojorono Tobacco Indonesia, játtað at rinda fyri viðgerðina, sum Susanto skal hava á einum sjúkrahúsi. Andi Susanto hevur greitt frá, at nú ætlar hann sær at leggja av at roykja.

# vistskipan



*At fiskurin við Føroyar flytir seg eystur og vestur heldur enn suður og norður, kemst av, at sjógvurin eystanfyri Føroyar er kaldari enn vestanfyri. Sostatt hevur tað somu ávirkan á fiskin undir Føroyum, tá hann flytur seg eystureftir, sum tað hevur fyri fiskin í Norðsjónum, tá hann flytur seg norðureftir*

*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*

son ber til at staðfesta gongdina. Tvær ferðir um árið ger havrannsóknarskipið yvirlitstrolingar á landgrunninum. Hesar kanningar eru ein týðandi partur av grundarlagnum, tá stovnsmetingar skulu gerast av fiskastovnunum undir Føroyum.

Um várið verða 100 trolstøðir tiknar og um heystið 200 støðir.

Í greinini vísir Eyðfinn Magnussen á, at tá trolið er komið á dekkið, verður veiðan skild í fiskasløg og gjørt verður upp, hvussu nógv er fingið av hvørjum slagi, bæði í vekt og í tali fyri hvørja einstaka støð.

- Tá somu støðirnar verða tiknar á hvørjum ári, ber til at samanbera og síggja, um fiskurin hevur flutt seg, sigur hann.

### Áhugaverd úrslit

Úrslitini, sum Hannipoula Olsen og Helga Báru Mohr Vang komu eftir, vísa, at útbreiðslumynstrið hjá fleiri fiskasløgum er broytt hesi árini.

- Eitt nú er toskurin meira eystarlaga um várarnar nú, enn hann var fyri nøkrum árum síðani. Men tað undarliga er, at hendan broytingin ikki er at finna hjá toskinum um heystið. Kanningin vísir eisini nøkur sera áhugaverd úrslit fyri tvey kongafiskasløg - stóra kongafiskin og trantkongafisk. Hesi hava flutt seg øvutan veg í mun til hvørt annað. Meðan stóri kongafiskur hevur flutt seg djúpari og meira vestureftir, hevur trantkongafiskur flutt seg á grynri vatn og meira eystureftir.

At fiskurin við Føroyar flytir seg eystur og vestur heldur enn suður og norður fyri at laga seg til hitabroytingar, kemst av, at sjógvurin eystanfyri Føroyar er kaldari enn sjógvurin vestanfyri.

- Sostatt hevur tað somu ávirkan á fiskin undir Føroyum, tá hann flytur seg eystureftir, sum tað hevur fyri fiskin í Norðsjónum, tá hann flytur seg norðureftir.

Eyðfinn Magnussen sigur, at nógv áhugaverd úrslit eru at finna í kanningini hjá nýggju biologunum.

### Órógva vistskipan

- Samanumtikið kann sigast, at fiskasløgini, har broytingar sóust, eru bæði av vinnuligum og ikki vinnuligum týdningi. Í niðurstøðuni siga tær báðar, at um hitin í sjónum heldur fram at økjast, kann hetta órógva vistskipanina í føroyskum sjógvi, so uppaftur størri broytingar fara at síggjast í framtíðini, sigur Eyðfinn Magnussen í síni grein á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum.

Greinin byggir á úrslit í kanningum og ritgerð hjá nýggju biologunum, Hannipoulu Olsen og Helgu Báru Mohr Vang.

# Søgan um Grand Bank

**- Um tað ikki er revolvarapolitikkur, sum kanadiumenn føra ímóti okkum, veit eg ikki, hvat eg skal kalla hetta, sigur skiparin á rækjutrolaranum Arctic Viking, Bjarni Petersen**

STRÍÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjarni Petersen heldur, at føroyingar hava alt ov skjótt við at geva seg undir tað, sum tey stóru londini siga, at vit skulu gera. Hetta sóu vit í Loynikrókinum á sinni, og hetta sóu vit við toskinum, tá hesin kom aftur miðskeiðis í 90-unum, eins og við makrelinum í 2008.

- Føroyar eiga ikki bara at tekkjast øðrum - og teimum stóru. Tí fegnist eg um avgerðina hjá okkara myndugleikum um aftur í ár at áseta okkara egnu kvotu í altjóða sjógvi á Grand Bank, tó at hetta kostar stongdar havnir í Kanada.

Skiparin heldur, at føroyingar í størri mun eiga at hugsa um, at havríkidømið er okkara lívsgrundarlag, og tí eiga vit at stríðast fyri okkara rættindum.

Bjarni Petersen er í løtuni umborð á rækjutrolaranum Arctic Viking, sum roynir á umstrídda økinum Grand Bank í altjóða sjógvi á Flemmish Kap.

Hann heldur ikki, at søgan um hesa leið er komin nóg týðiliga fram, nú Kanada aftur fer at steingja sínar havnir fyri føroyskum og grønlendskum fiskiskipum.

- Mær vitandi vóru føroyingar teir fyrstu, sum funnu út av, at nógvar rækjur eru á hesi leið. Hetta var í 1993 og sama ár, sum rækjurnar á Flemmish Kap vórðu funnar.

Skiparin sigur, at umstrídda økið á Grand Bank verður rópt ”Nose of the Bank”. Hetta er ein ”tunga” við góðum dýpi, sum stingur út um 200 fjórðingamarkið hjá Kanada. Økið, sum talan er um, er einar 100 fjórðingar suður og norður og einar 20 fjórðingar eystur og vestur, og her er nógvur annar fiskur enn rækjur, eitt nú svartkalvi, lodna og toskur, sigur hann.

Hann vísir á, at kanadiumenn vóru skjótir at seta forboð fyri at fiska rækjur á hesari leið á Grand Bank, hóast hetta var uttan fyri 200 fjórðinga fiskimarkið.

- Men eftir nøkur ár fekst semja um, at ein ávís nøgd kundi fiskast, og hetta var eftir, at føroyski rækjutrolarin Høgifossur eftir avtalu við Fiskirannsóknarstovuna hevði gjørt royndir á hesari leið nøkur fylgjandi ár.

Skiparin sigur, at seinni varð semja gjørd í NAFO um, at øll limalond skuldu fáa eina rækjukvotu á leiðini – og eisini lond, sum slett ikki høvdu fiskað á hesari leið.

- Lond, sum slett ikki fiskaðu rækjur yvirhøvur, eisini fingu kvotur eins og føroyingar. Hetta kundu føroyingar sjálvandi ikki góðtaka, tí úrslitið er, at tað sita menn í nøkrum av hesum londum, sum tilvildarliga fingu hesa kvotu og selja hana til tann, sum er grammastur at keypa.

Bjarni Petersen vísir á, at nú tvinga kanadiumenn okkum at spæla við í hesum ørvitisspæli við aftur at steingja sínar havnir fyri okkum.

- Um hetta ikki er revolvarapolitikkur so tað forslær, veit eg ikki, hvat eg skal kalla hetta, sigur skiparin á rækjutrolaranum Arctic Viking, Bjarni Petersen, skipari.

Samstundis, sum Kanada steingir sínar havnir fyri føroyskum og grønlendskum skipum, seta teir sær sjálvum stórar rækjukvotur innanfyri 200 fjórðingar – á sama øki og dýpi, har føroysku skipini fiska í altjóða sjógvi.




*Føroyskur rækjuskipari umborð á Arctic Viking sigur sína søgu um viðurskiftini rundan um umstrídda økið á Grand Bank*